DAGSINS MEINING

List er tilfeingi

Í ólavsøkurøðu síni segði løgmaður, at vit mugu taka upp kappingina og avbjóðingina, sum heimurin í dag krevur av okkum. Vit mugu líta út í heim. Men tá mugu vit fyrst viðurkenna okkum okkara samleika sum eina tjóð við góðum evnum. Hesi evni verða best hvest, um vit taka táttin upp, sum eitt nú nøkur av okkara fremstu mentafólkum hava víst, at vit føroyingar eiga. Við dugnaskapi og nærlagni hava nøkur av okkara ítróttarfólkum, tónleikarum, listafólkum og onnur víst, at hava vit trúnna upp á egin evni, so ber so ótrúliga nógv til. Hetta er ein ser áhugaverd samanbering.

Samanberingin er røtt og hon forpliktar bæði landsstýrið og teir bólkar, ið vera nevndir. Okkara ítróttarfólk og okkara listafólk hava tey seinastu árini skapað avrik og virði, ið vekja ans uttanlanda eins væl og her heima. Tá ið vit loyva okkum her at vísa á, at slík orð sum hesi hjá løgmanni forplikta, so hugsa vit um, alt tað sum liggur aftanfyru avrikini hjá listafólkum og ítróttarfólkum. Sama dag sum løgmaður helt røðu sína, var frálíki útleikurin framførdur í Havnargøtum. Hetta var ein glæsilig framførsla, ið var til mikið frægd fyri serstakliga børnini. Ólavsøkan hevur ikki havt nakað serligt at bjóða børnunum, og tí var útleikurin eitt frálíkt tiltak. Her fingu børnini eina ógloymandi lætu. Her klappaði alt. Spælið var á sera høgum støði, búnar og útgerð talaðu til hugflogið. Eit litríkt, dramatiskt og stuttligt tiltak, sum øll, ið vóru til leikin fegnast um.

Men hvussu ber tað til, at eitt slíkt tiltak kann setast upp á ólavsøku? Jú tað er tí, at vit eiga íðin og dugnalig fólk, sum umfam tíð og orku vilja nýta sínar listarligu gávur. Fyri at hesi fólk skulu kunna halda fram og menna sína list er neyðugt við einum virknum og visonerum mentanarpolitikki. Mentanarpolitkkur kostar skattakrónur, men hesar skattakrónur koma aftur fleiri ferðir. Hetta vita flestallir politikkarar. Skulu vit uppihalda og menna okkara listarliga støði, má tað almenna statsa meira uppá listina. Hetta merkir, at neyðugt er at játta meira til mentanarpolitikkin á eini komandi fíggjarlóg. Tað forpliktar at eiga góð listafólk. Men tey eru eisini eitt ríkt tilfeingi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Hugskot til at endurreisa Vágs Kommunu úr dvalanum

Petur S. Johannessen

Nú vilja ávísar kreftir leggja Suðuroy saman til eina kommunu, uttan at koma greitt fram við, hvørjir fyrimunir eru við eini samanlegging.

Tí fari eg at spyrja, hvørjir fyrimun Vágs kommuna fær, av at leggja saman við restini av oynni, kanska teir, sum hava verið frammi í fjølmiðlunum, kunnu svara meiri konkret upp á hetta.

Eg eri púra samdur við Vágs býráð um ikki at leggja allar komunurnar í oynni saman til eina kommunu, **men eg gangi eitt stig longur** og sigið, at vit í Vági ikki skulu leggja saman við nakrari komunu, vit eru líka nógv fólk í Vági sum samlaða fólkatalið í Sandoy er, og vit kunnu samstarva við hinar kommunurnar, og skal eg greiða í stuttum frá, hvat eg meini við niðanfyri.

Eg meini, at Vágsbygd skuldi havt sín egna lækna, prest og osv. tí vit síggja skilið í dag, eingin prestur stoðist, tí prestagjaldið er ov stórt, og eingin lækni stoðast, tí arbeiðsbyran er alt ov stór, men um vit bert eru vágbingar, sum hava ein lækna, minkar fólkatalið, sum læknin skal røkja munandi, vaktarskipanin sum læknarnir nýta í dag kundi hildið á fram sum nú er, og samstarvast kann/skal við hinar komunurnar har fyrimunirnir eru.

Vit í Vági skuldi tikið okkara vinarbý, Nakskov sum fyrimynd, (**teir høvdu 48% í arbeiðsloysi ,5 ár eftir er arbeiðsloysið millum 5-8%**), og reist Vágsbygd aftur eftir teirra leisti, nevniliga við at seta ein høgt mettan serfrøðing, sum hevur serkunleika og drúgvar royndir innan vinnulívið, og veit veruliga hvat vinnulívið leitar eftir (tørvir) og hevur eitt stórt kontaktnet og royndir at vísa á, hesin serfrøðingur fær ein púra greiðan yvirornaðan málsetning, »skapa fjølbroytt vinnulív í Vági«, so Vágsbygd kann koma upp á føtur aftur.

Hesin serfrøðingur fær sera víðar heimildir til at virka undir frá býráðnum, millum annað at seta/seta úr starvi fólk í umsitingini, og seta um neyðugt útlendingar í starv, um hesin útlendingurin hevur serligar førleikar, sum vit mangla í økinum, og roynir uttan stórvegis uppiblanding at fáa tillaga umstøðurnar rætt í Vági.

Hareftir verður Vágs kommuna bjóðað fram sum eitt øki, sum er lýst út í æsir, hvørjir fyrimunirnir eru og hvørjir vansarnir eru (sterkar og veikar síðir) fyri møguliga áhugaðar fyritøkur at koma til Vágs at virka, og við hesum útgangspunktinum setur býráðið seg í samband (lýsast kann eisini) við fyritøkur »world wide«, sum leita ella eru áhugaðar í akkurát hesum, sum vit hava at bjóða fram (segmentering). Eg eri sera vísur í, at vit fáa fleiri ymiskar fjølbroyttar fyritøkur her, sum skapa tað fjølbroyta vinnulívið, sum Vágs bygd hevur brúk fyri, vit skulu syrgja fyri, at Vág er sera áhugavert øki at koma til, og sum tekur serlig stig til at fáa vinnulív til Vágs og útnytta teir fáu fyrimunirnir vit hava, hetta er í hvussu er eydnast hjá Nakskov kommunu, eg meti, at hetta er fremsta uppgávan hjá Vágs býrað fyri at tryggja bygdina framyvir, eg sigi ikki, at Nakskovmodellið skal kopierast, men kann brúkast sum ein leistur til at endurreisa Vágsbygd.

Vit mugu sjálvi taka stig til at endurreisa bygdina, og ikki bíða eftir at Føroya Fiskavirking, og tað almenna annars hjálpir okkum, tí tað hava vit bíðað eftir í 20 ár ella meira, og eingin býar/løgtings limur, hevur enn verið førur fyri at fáa vinnulív til bygdina, sum veruliga munar, so nú haldi eg, at allar kreftir í bygdini skulu taka eitt felags stig og nýta Nakskov sum fyrimynd, so eri eg vísur í, at vit kunnu venda gongdini, men tað merkir einferð enn, at bygdafólki er við til at stuðla hesum, og ikki sum nú ganga í fleiri bólkum, vit mugu standa saman.

Tað er sera harmuligt at síggja, hvussu tað unga fólki streymar av bygdini, og ongantíð hevur møguleika at venda aftur, tí einki arbeiði relaterar til teirra útbúgving, og tað er sera harmuligt hjá foreldrum at vita, at børn og ommu/abba børn eru í besta fall í Føroyum (sjálvandi Tórshavn), men helst búgva hesi í útlondum, nú reisur spurningurin seg, um tað er nakar áhugi hjá barnafamiljum at verða í Vági sum heild, tí tey koma ikki at verða saman við sínum børnum, ommu/abba børnum eftir at teirra egnu børn eru farin av bygdini at viðari útbúgva seg sum 17 - 19 ára gomul, hetta hugsa nógvar ungar familjur um, tey kunnu ikki seta búgv í einum slíkum øki har teirra børn onga framtíð hava at búleikast, ella hvat?

Hetta meti eg er ein sera álvarsligur spurningur, foreldrini verða ikki partur av daglidegnum hjá sínum børnum og heldur ikki hjá ommu/abba børnunum, sum sjálvsagt ynskjuligt er, men møtast kanska einaferð um árið í einar 7-10 dagar.

Vilja ung foreldur seta búgv í Vági undir hesum fortreytum, samt tað at komunuskatturin er hægstur í landinum, eg ivist í tí?

Miðalaldurin í Suðuroynni nærkast 40 ár, so alarmklokkurnar eru byrjaðar at ringja.

Tí er tað í tøkum tíma at vit gera nakað munagott í Vági.

Eg dugi ikki í skrivandi løtu at finna nakrir fyrimunir, sum veruliga gera mun og harvið borga fyri einari kommunusamanlegging, hinvegin sum sagt, haldi eg at Vágsbygd/kommunan skal konsentrer seg um Vág, og gera tað áhugavert at búleikast her, og ikki sum nú, har fyrimunirnir ikki eru til at fáa eyga á.

Kommunuskatturin má tillagast so, at ein vágbingur ikki fær minni útgoldna løn enn ein sumbingur ella ein hvalbingur fyri sama arbeiði við somu lønarupphædd, hetta er veruleikin í dag, tí komunuskatturin er ymiskur, og tí mugu vit í Vági finna tað rætta stevið og koma upp undan vatnskorpuni og finna útav hvat vit vilja.

Hvat vit vilja er upp til hvønn einstakan, men vónandi kunnu vit koma uppá hædd við farnar tíðir, tá menn tóku megnartak bygdini at fram, tá tá t. d. fyrsta elektrisitetverk í Føroyum kom, trábanin á eiðinum og keiðin, ja hetta vóru megnar stig at taka tá, og vónandi kunnu vit ein dag røkka somu hæddum.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
einikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin

Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn

E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Leygardagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Um Alv-skúlan:

Grundgevingarnar fyri uppsøgnini av Øssuri av Steinum eru allar ósannar

Karolina Petersen

Øll tey, sum kenna hampamannin Øssur av Steinum, eru skakaði av, at nevndin fyri Alv hevur givið honum uppsagnarbræv. Øll á skúlanum við Áir og vit sum kenna nærri umstøðurnar vita, at hann er uppsagdur við grundgevingum, sum eru ósannindi úr enda í annan. Nýggja nevndin og nýggja fyristøðufólkið geva honum skuldina fyri trupulleikar á Alv-skúlanum, meðan veruligi trupulleikin er, at nevndin hevur sett ein leiðara, sum ikki hevur kvalifikatiónirnar til at leiða ein handilsskúla.

Fjølmiðlarnir hava seinastu tíðina roynt at funnið fram til, hvat er farið fram á Alv-skúlanum. Teir hava tó ikki funnið kjarnuna í málinum, partvís tí teir ikki hava fingið innlit í málið.

Alv-skúlin var frá byrjan í 1960 ein góðkendur handilsskúli, góðkendur av Handelsministeriet, sum tá hevði eftirlitið við handilsskúlunum í Føroyum. Í nærum 25 ár hevur lærarin Øssur av Steinum, verið leiðari av undirvísingini á skúlanum.

Tá Helena Dam á Neystabø gjørdist landsstýrismaður, vildi hon flyta virksemið hjá Alv til Havnar. Hon vildi brúka stovnin til at vinna sær atkvøður við. Hon hevði aldri áður víst stovninum nakran áhuga. Nú vildi hon útvega Alv 5 milj. kr. til ein vardan verkstað í Havn.

Fyri at tryggja, at nevndin gjørdi sum hon vildi, setti hon tveir partamenn úr Sjálvstýrisflokkinum, Bartal Kass og Jónas Johnsson, til formann og næstformann fyri Alv. Hvørgin av teimum hevði havt nakað samband við endurbúgving áður. Aftrat teimum, valdi Helena trý umboð fyri brekað í nevndina, millum onnur Doris Hansen fyri MBF. Eingin av hesum fólkum hevði fingist við endurbúgving fyrr. So í staðin fyri at fáa eina fakliga kvalifiseraða nevnd, gjørdist nevndin eitt partapolitiskt umboð.

Settu barnagarðslærara sum handilsskúlastjóra.

Menninir í Sjálvstýrisflokkinum gjørdu sum Helena hevði dikterað. Men tá teir skuldu seta nýtt fyristøðufólk, gjørdu teir beinanvegin hitt størsta mistakið. Nevndin setti ein barnagarðslærara, Kristinu Larsen, sum leiðara. Teir bóðu síðan Øssur av Steinum um, at hon fyri fyrst kundi brúka hansara skrivstovu á skúlanum við Áir.

Skeldaði lærarar og starvsfólk.

Bilsin gjørdust lærarar og starvsfólk á skúlanum, tá nýggja fyristøðukvinnan fór at skelda tey út og briksla teimum, at tey dugdu ikki til teirra arbeiði. Bæði upp í eyguni á teimum og við útspilling aftan fyri ryggin á teimum, td. segði hon við næmingarnar, hvussu lítið lærararnir á skúlanum nyttaðu. Við eitt starvsfólk segði hon, at Øssur var óbrúkiligur sum fyristøðumaður. Hon var sostatt illoyal og undirgravaði virðingina fyri lærarunum frá fyrsta degi.

Hon hevði ikki sjálv ta útbúgving, sum krevst av einum handilsskúlaleiðara. Fyri at vera handilsskúlafyristøðufólk krevst, at viðkomandi hevur eina handilsfaklæraraútbúgving. Hana hevur Øssur av Steinum. Aftrat barnagarðsútbúgving, hevði Kristina Larsen bert eitt hmx-prógv og eitt Kompleprógv, sum hvørki kann verða brúkt í handilsskúlasamanhangi. Nevndin hevur, eftir øllum at døma, ikki spurt seg fyri í Mentamálaráðnum, um treytirnar fyri at gerast handilsskúlafyristøðufólk.

Starvsfólkini hóttu við at fara til hús.

Tað hevur ongantíð fyrr verið klandur á skúlanum við Áir, og ongantíð verið øvugt orð millum Øssur og meg. Nú nýggja fyristøðukvinnan kom á skúlan, gjørdi hon við síni niðurgerandi viðferð av starvsfólkunum, at nøkur av teimum vórðu sálarliga niðurundirkomin av henni. Aftaná 10 mánaðir sendu lærarar og starvsfólk boð til nevndina, at tey orkaðu hana ikki longur og fóru at rýma til hús og ikki koma aftur á skúlan, fyrrenn fyristøðukvinnan var farin av húsinum. Nevndin gjørdi tá av, at Øssur skuldi hava fulla ábyrgd av skúlanum og at nýggja fyristøðukvinnan skuldi ikki koma aftur á skúlan.

Ósannindi aftanfyri uppsagnarbræv.

Øll, sum kenna hampamannin Øssur av Steinum, eru tí illa við av, at nevndin nú roynir at geva honum skyldina av íkomnu støðuni.

Nevndin hevur valt síðu. Nevndin hevur valt at trúgva tí nýggju fyristøðukvinnuni, hóast starvsfólkini á skúlanum meta, at trupulleikin er fyristøðukvinnan.

Av tí, at nevndin ikki vil viðganga, at hon hevur gjørt eitt mistak, við at seta ein persón, sum ongar fakligar fyritreytir og ongar menniskjansligar eginleikar hevur, fyri at leiða ein tílíkan stovn, hevur nevndin uppfunnið nakrar grundgevingar fyri at siga Øssuri upp. Eingin av hesin grundgevingum heldur.

Fyrsta grundgevingin.

Nevndin sigur: "tá nýggja fyristøðukvinnan varð sett í starv, royndu vit at fáa skipað setanarviðurskiftini hjá lærarunum á Alv-skúlanum. Henda royndin datt niður fyri, av tí, at tygum settu tygum hart upp ímóti hesum arbeiði fyri síðani at reka fyristøðufólki av húsinum við at steingja skúlan og taka næmingarnar sum gíðslar í málinum".

Ósannindi:

Tað var ikki bara Øssur, sum "rak fyristøðufólkið av húsinum". ØLL starvsfólkini á skúlanum vóru SAMD um at rýma til hús, tí tey orkaðu ikki at arbeiða undir nýggju fyristøðukvinnuni. Tey fóru ØLL til hús og noktaðu at koma aftur, fyrrenn tey fingu vissu fyri, at nýggja fyristøðukvinnan ikki kom aftur á skúlan. Eitt av starvsfólkunum sigur, at talan var um sálarligan tortur, sum hon var útsett fyri av fyristøðukvinnuni. Eitt annað starvsfólk fekk eitt sera niðurgerandi skriv frá fyristøðukvinnuni um forleikan há honum til arbeiðið. So nú at siga, at Øssur var einsamallur um at steingja skúlan, eru ósannindi. Hann gjørdi hetta fyri at verja hini starvsfólkini á skúlanum, sum ikki vildu arbeiða undir nýggju fyristøðukvinnuni.

Onnur grundgevingin.

Nevndin sigur um Øssur, at "tygum hava yvir fyri almennum myndugleikum lagt Alv-stýrið undir at hava stolið pening frá Alv-skúlanum".

Ósannindi:

Øssur hevur ikki yvir fyri nøkrum almennum myndugleika lagt Alv-stýrið undir at hava stolið pening frá Alv-skúlanum. Nevndin nevnir einki um, nær hetta skuldi verið hent, og við hvønn Øssur skal hava sagt hetta. Hinvegin er tað skjalfast, at fyristøðukvinnan hevur tikið pening, sum skúlin hevði fingið frá Almannastovuni fyri næmingar, og flutt hann til konto hjá varda verkstaðnum í Smiðjugerði, og at nevndin hevur góðkent hesa flyting. At taka merkir ikki neyðturviliga tað sama sum at stjala. Møguliga er tað hetta, ið Alv-nevndin hevur misskilt.

Triðja grundgevingin.

Nevndin nýtir sum grundgeving fyri uppsøgnini, at ósemja er um pening, sum nýggja fyristøðukvinnan hevur flutt frá skúlanum til verkstaðin í Smiðjugerði. Nevndin sigur um hetta, at "tygum vóru kunnaður um hesar flytingar, áðrenn tær vóru gjørdar".

Ósannindi:

Hetta er eisini ósatt og hetta kann skjalprógvast. Til dømis flytir nýggja fyristøðukvinnan 550 túsund krónur tann 17. januar, skrivar ikki brøv til skúlan fyrrenn 19. januar, uppundir eitt vikuskifti, so skúlin fær ikki fráboðanina fyrr enn 22. ella 23. januar. Fyristøðukvinnan boðar sostatt ikki skúlanum frá, at hon hevur flutt 550 túsund krónur av skúlans peningi fyrr enn nakrar dagar aftaná, at hon hevur flutt peningin.

Fjórða grundgevingin.

Nevndin sigur: " av tygara eintingum hava flutt 160.000 kr. til lærarar skúlans, hóast ósemja er um lønarmálið, ið gongur í rættinum".

Ósannindi.

Hetta er grov ósannindi, og kann eisini skjalprógvast. Øssur hevur biðið Føroya Lærarafelag um útrokningar av fólkaskúlalæraralønunum og Handilsskúlalærarafelagið um útrokningar av handilsskúlalæraralønunum. Hesar útrokningar eru seinni góðkendar av Fíggjarmálaráðnum.

Øssur hevur ikki flutt nakað av sínum eintingum. Semja hevur leingi verið um, at skúlin skyldar lærarunum eitt lønareftirgjald uppá 631.000 kr. Tær 160.000 kr. vóru bert ein partur av hesum eftirgjaldi. Nevndin hevur ikki viljað rindað henda pening, so málið er farið í rættin eftir kravi frá Føroya Lærarafelag.

Nevndarformaðurin Doris Hansen hevur longu viðgingið, at grundgevingin um, at Øssur av Steinum hevur flutt lærarum løn "av sínum eintingum" ikki heldur. Við Dimmalætting mikudagin 14.juli sigur hon, at allir lønarspurningar eru greiddir.

Tað er rætt. Doris Hansen viðgongur harvið, at Øssur av Steinum hevur havt rætt og at nevndin hevur havt órætt.

Fimta grundgevingin.

Nevndin sigur um Øssur, at: "tygum hvørki hava skilt, hvussu skúlin var fíggjaður áðrenn 1. januar 2003 ella undir núverandi fíggingarmynstri".

Ósannindi.

Vanliga verður hugt eftir, um stovnsleiðarar halda seg innan fyri teir rakstrarkarmar, sum teir fáa tillutaðar. Øssur hevur alla tíðina hildið seg innan fyri teir rakstrarkarmar hann hevur fingið tillutaðar.

Nevndin hevur heft seg við, at Øssur hevur goldið 160 túsund krónur av lønareftirgjaldingum í januar mánað 2003, eftir at skúlin 1. januar 2003 er farin yvir til vanliga rakstrarjáttan.

Aftur her er tað nevndin sjálv, sum við uppsagnarskrivinum vísir, at hon ikki hevur skilt játtanarskipanina.

Játtanarskipanin hjá Alv-skúlanum til og við 2002 er lýst í viðmerkingunum hjá Landsgrannskoðaranum. Skúlin fær " eitt ávegis gjald, og tá árið er liðugt, ger skúlin samlaða kostnaðin upp. Undirskotið verður lutað sundur á teir næmingar, sum hava gingið á skúlanum". Hendan skipan verður vanliga nevnd "undirskotsdekning".

Hesa skipan hevur skúlin havt frá byrjan í 1960. Skúlin rindaði á hvørjum ári undirskotið við egnum gjaldføri, og fekk síðan peningin aftur frá Almannastovuni.

Sostatt skyldaði Almannastovan Alv pening í januar 2003 fyri figgjarárið 2002.

Øssur hevði tí bæði rætt og skyldu at rinda lærarunum tann pening í januar 2003, sum Alv skyldaði fyri 2002.

Uppsagnarskrivið vísir sostatt, at nýggja fyristøðukvinnan og nevndin eru ósamd við Landsgrannskoðarin og halda seg hava betri skil fyri játtanarskipan landsins enn hann.

Sætta grundgevingin.

Nevndin lastar Øssur fyri at hann hevur goldið omanfyrinevnda lønareftirgjald í januar 2003. Nevndin harmast um at "ALV síðandi hevur verið noytt at flyta henda pening aftur til Almannastovuna av sínum egna rakstrarkapitali".

Ósannindi.

Hetta vísir, at nevndin ikki hevur skilt játtanarskipanina, sum var galdandi til 1. januar 2003. Alv hevur á hvørjum árið goldið hallið við egnum rakstrarkapitali. Alv hevur síðan fingið hallið endurrindað frá Almannastovuni.

Alv átti tí at lati Øssur flutt alt lønareftirgjaldið uppá 631 túsund krónur av rakstrarkapitalinum hjá ALV, tí ALV hevði síðan fingið hendan pening endurrindaðan frá Almannastovuni. Tað er tí fyristøðukvinnan og nevndin, sum hava gjørt ein feil við at flyta pening frá skúlanum til verkstaðin í Smiðjugerði, so Øssur ikki fekk goldið alt lønareftirgjaldið.

Nýggja fyristøðukvinnan skifti grannskoðara.

Ein kann undrast yvir, at nevndin kann fara so skeiv og siga so nógv ósannindi. Nevndin hevur tó sjálv ábyrgdina av tí óføri hon er komin í. Seinastu 25 árini hevur sami grannskoðarin hjá grannskoðaravirkinum Inpact grannskoðað roknskapin hjá Alv. Uttan nakra grundgeving skifti nýggja fyristøðukvinnan og nevndin grannskoðaran út .Tey mistu harvið nógva vitan um játtanarviðurskiftini hjá stovninum.

Sjeynda grundgevingin.

Vegna nýggju fyristøðukvinnuna rekur nevndin í uppsagnarskrivinum uppundir, at Øssur hevur verið torførur at samarbeiða við.

Framhald á næstu síðu